

# GGJAN BÝLING

» Vit vænta eisini, at nýggi býlingurin fer at skapa lív og menning við Gjógv, har fólkatalið tíverri er minkað rættiliga nógv seinnu árini

SUNDA KOMMUNA

» Eg veit væl, at Gjógv liggur eitt sindur avsíðis. Men fyri okkum ger tað einki

JÓAN PETUR VANG

» Hetta er eitt gott stað, um ein ynskir at koma burtur frá tí vanliga umhvørvinum

JÓAN PETUR VANG

## 135.000 krónur

Í longri tíð hevur verið arbeitt við ætlanini at byggja hesi frítíðarhúsini við Gjógv.

Tað kemur ikki av ongum, tí sambært borgarstjóranum, Kim Durhuus hevur langur bíðilisti verið eftir teimum.

- Vit hava havt eini 50 fólk standandi á bíðilista, hevur hann áður upplýst fyri heimasíðuni hjá kommununi.

Nú verður so møguleiki hjá 16 teirra at fáa dreym sín at gerast veruleiki. Í juli mánaði var fundur millum umboð fyri kommununa og tey sum ætlaðu sær eitt slíkt frítíðarhús.

Seinni skuldi eitt eigarafelag stovnast, og nú verður sæð fram ímóti tí degi, tá byggingin av álvara kann setast í verk.

Prísurin fyri grundøkini lá, sambært heimasíðuni, millum 135 og 195.000 krónur. Hetta var eisini ein orsøk til, at so mong helst tóku av tilboðnum.

- Við hesum prísi er fíggjarligt grundarlag hjá kommununi at fáa byggiætlanina útførda.

- Vit vænta eisini, at nýggi býlingurin fer at skapa lív og menning við Gjógv, har fólkatalið tíverri er minkað rættiliga nógv seinnu árini, verður sagt úr kommununi.

## 16 FYRST

At fremja eina slíka ætlan tekur sjálvandi sína tíð hjá eini lítlari, men kortini víttfevndari kommunu. Hinvegin var áhugin fyri ætlanini stórur. Óhugsandi er ikki, at enn fleiri frítíðarhús verða bygd her einaferð í framtíðini.

Tey, sum í øllum førum fara at byggja hesi fyrstu 16 húsini, koma nógvastaðni frá. Summi hava tilknýti til bygdina; onnur ikki. Tey eru úr Norðoyggjum, Sundalagnum og úr Havn.

Ætlanin var upprunaliga, at eigararnir skuldu sleppa inn á økið at stoypa sokkulin í ár.

- Eg vænti, at til várs og summar fara fleiri av húsunum at koma upp. Sjálvur vóni eg at kunna halda frí í mínum húsum komandi summar ella heyst, sigur Jóan Petur, sum ætlar at bjóða seg fram at smíða frítíðarhús fyri onnur.